# Landsstýrið leggur á annan bógv í útlendingamálinum

**– Nú verður umhugsað at seta eitt serligt arbeiðsmarknaðarráð, sum skal ummæla umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum**

ÚTLENDINGAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú ætlar lanndsstýrið at leggja á annan bógv í útlendingamálinum.

Spurningurin um útlendingapolitikkin hjá føroyingum varð viðgjørdur á seinasta landsstýrisfundinum fyri jól, sum varð hildin umborð á Smyrli.

Á tí fundinum fekk landsstýrismaðurin í innlendismálaráðnum grønt ljós at broyta mannagongd í sambandi við útlendingamálini.

Higartil hevur tað verið so, at innlendismálaráðið hevur viðgjørt allar umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum við tí fyri eyga at geva danska útlendingastýrinum eitt ummæli um umsóknin skal gangast á møti ella ikki.

Tað er síðani danska útlendingastýrið, sum tekur endaligu avgerðina, grundað á tilmælið.

– Hetta hevur kravt rættiliga nógva umsitingarliga orku í innlendismálaráðnum, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálaráðnum.

Samstundis hevur ætlanin verið, at innlendismálaráðið skuldi útgreininga alt útlendingamálið og at orða ein føroyskan útlendingapolitikk.

Men tað hevur umsitingarlig orka ikki verið til, tí júst arbeiðið at ummæla umsóknir, stjelur so nógva arbeiðsorku frá umsitingini.

– Tað, sum landsstýrið tískil nú ætlar, er, at leggja umsitingina av útlendingamálinum uttanfyri innlendismálararáðið, so at øll orka í ráðnum kann brúkast til arbeiðið at útgreina útlendingamálið og at orða ein føroyskan útlendingapolitikk.



*– Higartil hevur tað verið innlendismálaráðið, sum hevur ummælt umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Men nú er hugsandi, at eitt serligt arbeiðsmarknaðarráð verður sett at røkja ta uppgávuna, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður.*

### Arbeiðsmarknaðurin veit best

Jacob Vestergaard sigur, at enn er ikki heilt greitt, hvør so tað so skal vera, sum skal ummæla umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Frammanundan hevur løgreglan ein part av viðgerðini um hendi og spurningurin er so, um meiri arbeiðið skal leggjast á løgregluna í hesum sambandi.

Men spurningurin um ein umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi skal gangast á møti, ella ikki, er ógvuliga nær tengt at støðini á arbeiðsmarknaðinum.

Eitt, sum verður umhugsað, er, at skipa eitt slag av arbeiðsmarknaðarráðið, sum skal ummæla umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Jacob Vestergaard heldur, at av tí at støðan á arbeiðsmarknaðinum hevur so stóran týdning í hesum sambandi, er tað natúrligt, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða tiknir meiri upp í viðgerðina av útlendingamálinum.

– Eitt arbeiðsmarknaðarráð við fakligum umboðum fyri arbeiðsgevarar sovæl sum løntakarar, og kanska almannastovuna, ALS og aðrar stovnar við, hevur til eina og hvørja tíð rættiliga góða føling við støðuni á arbeiðsmarknaðinum.

Tey kunnu so altíð upplýsa, hvussu veruliga støðan er á arbeiðsmarknaðinum til eina og hvørja tíð og eitt tilmæli um arbeiðs- og uppihaldsloyvi kann so verða bygt á tað.

Jacob Vestergaard staðfestir, at tað kemur ofta fram, at fólk fæst ikki til arbeiðis, hóast tølini hjá ALS vísa, at talan er um arbeiðsloysi.

– Tað kann vera ein ábending um, at hagtølini hjá ALS um arbeiðsloysi, ikki spegla veruligu støðuna á arbeiðsmarknaðinum. Men eitt arbeiðsmarknaðarráð kann hinvegin koma við neyvari upplýsingum, enn tølini hjá ALS kunnu geva.

Tí er hugsandi, at eitt slíkt arbeiðsmarknaðarráð verður sett at ummæla umsóknir frá útlendingum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, sigur landsstýrismaðurin í innlendismálum.

Hann sigur, at beinanvegin eftir nýggjár, verður farið í holt við tað arbeiðið. Samstundis verður miðað eftir, at arbeiðið at orða ein útlendingapolitikk skal verða liðugt á ólavsøku.




## Blaðfólk

Á redaktión okkara er spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini í Vágsbotni. Hartil er ynskiligt, at viðkomandi eisini røkir aðrar uppgávur kring landið. Fyrst og fremst í Norðoyggjum.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum um 15. januar, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta. Er talan um rætta umsøkjaran, kunnu vit eisini bíða til 1. februar.

Við rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um at skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært avtalu millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, blaðstjóra, á tlf. 341800. Ella við at senda teldupost á jan@sosialurin.fo

Seinasta freist at søkja starvið er 31. desember 2005, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umfram tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*

# Teldumaðkur gjørdi kál á kjak.fo

**Nógv vitjaða føroyska kjak síðan kjak.fo varð í gjár álopin av einum teldumaðki, síðan verður væntandi ikki virkin aftur í ár**

ALNETIÐ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá vitjandi skuldu inn á vælumtóktu kjaksíðuna www.kjak.fo í morgun, komu á lastar dyr, og boðini vóru, at síðan hevur verið fyri hakkara álopi ella onkrum tílíkum og at arbeitt verður við at fáa síðuna at rigga aftur. Maðurin handan kjak.fo Petur Kirke sigur við Sosialin, at hann ikki heldur, at nakað data er mist, sum er, men hetta er ikki vist enn. Síðan verður væntandi ikki nýtilig aftur fyrr enn aftan á nýggjár, sigur Petur.

Talan er um ein sokallaðan teldumaðk, ið loypir á heimasíðir, ið eru gjørdar við skipanini phpbb, ið er linuxskipanin, ið kjak.fo er gjørd í. Hesin teldumaðkur fór undir sína herjan fyrst í desember, og eyðkenni er, at hann leggur boðini "FUCK YOU 0X1FE AND ALL PEOPLE IN UR CHANNEL ;) FUCK BOTS, FUCK BOXTALK HOPE ALL U LAMERS GET BUSTED, SOON I OWN U ALL!!! Credits to sirh0t, nico (pussy licker) and phpbb" Hesini boðini fingu kjak.fo á sína síðu í gjár.




Petur Kirke sigur, at tey vilja tryggja sær, at tey ikki missa nakað, tí nógv túsund innlegg liggja á síðuni. Tí hava tey heitt á phpbb.com um at hjálpa við at bjarga síðuni, og hetta kann taka nakrar dagar.

Út við 1000 brúkarar brúka kjak.fo, og síðan er vorðin ein stórur partur av almenna kjakinum í Føroyum.